# VØRUHÚSIÐ Á HJALLA

Sovisofa (Selma)
útbreidd 155x200
Bert 2.498,-

Stórt kuffert
-50% av útsøluprísinum
Nú bert 299,-

4 koppar
v/undirskál
Bert 19,95

Ólavsøkutilboð

Hornasofa (Verona Lux)
Grá - mikro velour



Bert 6.998,-
Sofaborð 398,-

Paraplyir
fleiri sløg og litir



Bert 29,95
og 49,95

Takmáling



5 litur
Bert 398,-

GeForce 2Mx200
32 MB Ram grafikkort



Fyrr 1.100,-
899,-

Drykkiglas
Tak 6 smá ella 6 stór



Karaffel
Bert 19,95

Frítt val
Bert 19,95

Heilfjalandi træverja
fæst í øllum litum



5 litur
bert 398,-

Logitech tráloyst
tastatur og mús



Fyrr 1.198,-
Nú 998,-

Rally teppi
4m breitt, ljóst
væl egna til
gongd og
kamar



Fyrr 295,-pr.m
Nú 98,-pr.m

Sadolin Facade máling
+ 1 pensilsett



10 litur
bert 768,-

60 dellir steintoy (studio)



Bert 399,-

Lamett gólv
fæst í bók, eik, furu, kirsiber,
merbau og ahorn



Bert
99,-pr.m2

Øll loys teppir
- 20%

Regnslag
Bert 10,-

Vøruhúsið á Hjalla
Tel 342300 • www.Hjalli.fo






# Taka Kyrjastein uppaftur

**Kyrjasteinur, sum eina tíð hevur ligið sokkin á Fuglafirði, verður nú ætlandi tikin uppaftur**

SKIPSBJARGING
*Edvard Joensen*

Kyrjasteinur, sum stendur á botni á Fuglafirði, skal takast upp aftur, tí hann er til ampa fyri skipaferðsluna á Fuglafirði.

Kyrjasteinur kom aftur til Fuglafjarðar fyri nøkrum árum síðan eftir at hava verið í eini longri útlegd. Skipið var tikið úr skrásetingini, og ætlanin var at seta tað í stand at hava sum savn á Fuglafirði.

Ymiskt er, sum tað gongur eftir ætlan. Og ikki ókent er, at tað gongur ikki altíð, sum ætlað er. Soleiðis eisini við Kyrjasteini. Hann varð lagdur fyri teym á Fuglafirði. Líkasum til at goyma til betri tíðir.

Men so ein vakran dag sakk hann bara beint niður, har hann varð standandi við mastratoppinum undan, tá líkindini vóru soleiðis.

Skrokkurin hevur verið til eitt sindur av ampa hjá teimum, sum vara av skipaferðsluni á Fuglafirði, og avgjørt er nú, at hann skal takast uppaftur.

Í Fuglafirði eru tey so heppin, at tey eiga ein kavara, sum fyrr hevur roynt at taka sokkin skip upp. Tað er Høgni Kjeld, sum í 13 ár hevur arbeitt sum kavari.

Høgni Kjeld hevur nú eina tíð arbeitt við at fáa Kyrjastein aftur á flot. Hann sigur, at tað hevur víst seg at verða truplari, enn hann hevði væntað, tá hann fór undir arbeiðið.

Hann sigur, at hann hevur arbeitt við at fáa lagt stroppar undir skrokkin, eins og hann hevur lagt tangar, sum skulu fyllast við luft, inn í skipið.

Kyrjasteinur er sokkin beint niður og stendur, at síggja til, púra óskaddur á botni.

Skipið stendur umleið hálvannannan metur niðri í móru og leiri, so tað er rættiliga fæst. Hartil kemur, at tað helst vigar út móti tí dupulta av tí, væntað var. So ætlanin við at fáa tveir sandbátar at hevja skrokkin, fer ikki at bera til.

– Kanska Brimil hevur orku til tað, heldur Høgni Kjeld. Ella okkurt av offshore skipunum, sum nú eru her av og á.

Men tað er ikki bara sum at siga tað at fá eina slíka bjarging at passa í teirra arbeiðsdag.

At skipið stendur langt niðri í móru og leiri ger, at tað verður sera ringt at fáa tað leyst. Heilt nágreiniliga hvussu tað verður gjørt, dugir Høgni Kjeld ikki at siga í løtuni. Men hann arbeiðir við málinum og vónar, at klárt verður at hevja Kyrjastein í hesi vikuni.



*Nakað av umvælingararbeiði varð gjørt, áðrenn Kyrjasteinur varð lagdur fyri teym á Fuglafirði*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ítróttardagar á Eiði



*Emil Olsen, prestur, byrjar EB dagarnar við ítróttarguðstænastu Niðri á Møl*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Teir árligu EB dagarnir, ið hildnir vera sum ein bygdarstevna á Eiði, verða nú um vikuskiftið**

ÍTRÓTTARDAGAR
*Edvard Joensen*

Árligu ítróttardagarnir hjá Eiðis Bóltfelag, teir sonevndu EB dagarnir, verða hildnir á Eiði komandi vikuskifti.

EB dagarnir eru sum ein vanlig bygdarstevna, sum vit kenna tær ymsastaðni frá hesa tíðina.

EB dagarnir byrja fríggjakvøldið klokkan 18.00, tá Emil Olsen, prestur, heldur ítróttarguðstænastu við fótbóltsvøllin Niðri á Møl. Hetta tiltakið varð eisini í fjør, og eydnaðist tað heilt væl. Væl av fólki var samankomið, og undir heilt óformellum umstøðum, var ein hugnalig og væleydnað guðstænasta hildin undir opnum himli.

Skráin annars er á leið sum aðrar slíkar stevnur plaga at vera. Kappingar av ymsum sløgum. Hoppiborgir, tombola, ponyríðing, dansur og ikki at gloyma pylsuvognin, sum tykist vera ein tann trúgvasti stevnuluttakarin yvirhøvur.

Kajak og kanoframsýningar verða Niðri á Vatni, og eisini fer at bera til at leiga sær ein túr við hesum førunum. Sum ein av skemtikappingunum, verður eisini rógvikapping millum ávísar kendar persónar.

Eitt afturvendandi tiltak á hesum EB døgunum er triatlon kappingin, har svomið verður tvørtur um vatnið. Síðan verður súkklað av Mølini út á Torvanes og aftur, áðrenn endað verður við at renna kring vatnið. Hetta tiltakið hevur verið væl umtókt, og í ár verða eisini tvær kvinnur við í kappingini. Og ikki færri enn 10 menn hava boðað frá luttøku í ár.

Fótbóltsvøllurin Niðri á Møl hevur seinnu tíðina eisini verið brúktur til lokalar krokkkappingar. Og eisini hesir garparnir - og annars tann, sum hug og evni hevur - fara at royna seg við skipaðari krokkkapping hesar dagarnar.

Umframt verður eisini fótbóltur á skránni. Bæði landskapping í 5. deild, eins og skemtidystir eisini verða leiktir.

Sum vanligt er á flest øllum stevnum, verða eisini kristilig útimøti hildin. Samkoman í Mizpa fer leygarkvøldið klokkan 19.00 at hava útimøti á Vaglinum.

Seinni leygarkvøldið - klokkan 22.00 - verður felagssangur á Vaglinum, har Rasmus Joensen, eiðismaður í Havn, fer at halda røðu.

Eitt annað tiltak verður eisini beint eftir felagssangin. Tað er ein sonevnd meksikansk uppboðssøla, har ein veðrur verður seldur. Tað varð eisini roynt í fjør, og gav felagnum heilt fitt av peningi.


Hendur & Hugflog

Søluframsýningin fyri
listhandverk og heimavirking

í Høllini á Hálsi 20. - 22. juli

**Fríggjadagur 20. juli**
kl. 15.00 Framsýningin letur upp
kl. 16.00 Framsýningin verður sett
Fimleikagentur dansa
kl. 18.00 Harmonikutónleikur
kl. 20.00 Framsýningin letur aftur

**Leygardagur 21. juli**
kl. 14.00 Framsýningin letur upp
kl. 15.00 Fimleikagentur dansa
kl. 16.00 Móta- og vørusýning
kl. 17.00 Tøkum Lætt sýnir føroyskan dans
kl. 18.00 Móta- og vørusýning
kl. 20.00 Framsýningin letur aftur

**Sunnudagur 22. juli**
kl. 14.00 Framsýningin letur upp
kl. 15.00 Móta- og vørusýning
kl. 16.00 Tøkum Lætt sýnir føroyskan dans
kl. 17.00 Móta- og vørusýning
kl. 18.00 Fimleikagentur dansa
kl. 20.00 Framsýningin letur aftur

Føroya Heimavirkisfelag og Menningarstovan